








# Stór raðhús í Maritugøtu í Hoyvík

## Innrætting og stílur

Hetta eru eini raðhús har eigarin hevur hugsað um hvørja detalju – einki er standard.

Raðhúsini eru í tveimum hæddum, umframt ein skúr og umframt eitt ovastaloft, sum kann nýtast sum goymslurúm. Rúmini er ljós - veggirnir eru allir ljósir og hurðarnar eru hvítar. Loftini og gólvini eru úr ljósum træi.

Í niðaru hæddini er ein gongd, eitt baðirúm, ein grovkøkur, ein køkur og ein stova, umframt ein skúrur. Gongin er sera rúmlig og ljós. Baðirúmið snotisligt við ljósum flisum við hita á gólvinum. Køkurin er úr kirsuberja við nútímans hvítvørum og fellur væl inn í alt ta ljósa innan.

Í ovaru hæddini er ein gongd, eitt baðirúm, trý kømur og eitt klæðnarúm. Baðirúmið er rúmligt við bæði brúsu og einum nútímans gosbaðið og klæðnarúmið hevur tú møguleika fyri at gera til eitt kamar um tú hevur tørv á fleir kømrum.

Spot og antennustik eru í nærum øllum rúmunum.

## Terassa

Útgongd er bæði frá køkini og stovuni til eina stóra hugnaliga terassu við áløgdum brotflísum. Vindeyguni í stovuni er stór, frá gólv til loft, so her kanst tú sita og nýta vøkru terassuna innanfrá eisini. Á terassuni hevur tú góðar møguleikar at hava havamøblar standandi og krukkur við blómun. Eisini eru bedir við blómum framvið terassuna. Eins og frá stovuni og køkini er útsýnið framúrskarandi frá terassuni. Tú sært útyvir alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin.

## Parkeringspláss

Til raðhúsini eru tvey parkeringspláss við áløgdum brotflísum, umframt eitt felags parkeringsøkið.

## Umhvørvið

Raðhúsini standa í Maritugøtu í Hoyvík, sum er eitt sera barnavinarligt umhvørvi – tó eisini eitt umhvørvi, sum er fyri bæði ung og eldri. Stutt er til vøggustovu, barnagarð, skúla, ítróttarhøll, kirkju og handlar. Ein nýgjørdur UEFA-sparkivøllur er beint við.

Atgongd er til býlingshúsið og eitt gott eigarafelag er, sum skipar fyri ymiskum tiltøkum og eisini hava øll felags antennuskipan.

Raðhúsini hava framúrskarandi útsýni yvir alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin.

**Fakta:**
Maritugøta 3, Hoyvík

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 2003 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 156 fermetrar |
| Grundøkið: | 173 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.900.000 |

skyn

Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo